# Høgni Lisberg skuffaði aftur

G!
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Hóast eg teljist millum størstu Høgna Lisberg fjepparanar, havi eg trupult við at finna jalig lýsingarorð um konsertina hjá Høgna á spæliplássinum leygardagin. Jú, jú gamaní, løgini eru góð. Høgni eigur eina samling av ordiliga góðum og væl skrivaðum løgum, men konsertin gjørdist ein keðilig uppliving, við nøkrum fáum undantøkum.

Hetta er aðru ferð, eg hoyri Høgna í nakrar mánaðir, og niðurstøðan hjá mær er tann sama. Høgni er ikki trupulleikin, stóri trupulleikarnir eru gittar- og ljómborðleikararnir, ið ikki duga at lyfta løgini við sínum spæli. Serliga er valið av ljóðum hjá hesum báðum royndu tónleikarum ringt. Tey friðarligu løgini riggaðu slettis ikki, og tá Høgni í stóran mun hevur friðarlig løg, so var hetta óheppið.

Eg royndi veruliga at lurta, men alt ov ofta gjørdist tónleikurin til bakgrundstónleik, og eg varð fangaður av samrøðum við fólk. Undantøkini vóru tey meira rokkendu løgini. Tá ljóðaði tað sum ein bólkur, og eg varð fangaður eina løtu.

Frásøgumaðurin fekk Høgna róptan út at spæla eykalag, og tolkingin av "All along the Watchtower" hjá Bob Dylan var hampulig, men Høgnasa partur lá ikki eftir á, hann sang lagið hjartaliga og við stórari innliving.

# Ein lítil konsert við Knút Háberg Eysturstein

G!
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Ljómborðspælarin í Gestum, Knút Háberg Eysturstein, telist millum bestu føroysku einstaklingarnar í Singer/Songwriter bólkinum. Knút hevur skrivað nøkur vøkur og fangandi løg, sum áttu at riggað væl á sandinum leygardag klokkan tvey - men tað gjørdu tey ikki.

Sera fá fólk høvdu leitað sær oman á sandin at lurta eftir unga eysturoyinginum. Vit, sum vóru har, hoyrdu: Knút við sínum vælspælandi bólki, sum ongantíð veruliga fekk vind undir veingirnar. Konsertin var ikki ring, men fer heldur ikki at teljast millum tær størstu tónleikaupplivingarnar á G!. Knút virkaði ikki heilt so væl upplagdur, og innlivingin manglaði bæði hjá tónleikarum og áhoyrarum.

Hæddarpunktið var kontrikenda tolkingin av lagnum "Shine", sum veruliga er gott.

# Makrel spældu eina frálika konsert á Gøtusandi

G!
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Makrel er ein tann bólkurin, sum hevur ment seg mest hetta seinasta árið, og á G! vístu teir, at teir nú megna at spæla fyri heilt stórum áhoyrarafjøldum, og at halda nógvu áhoyrarum sum trøllabundnum. Tað er minnið enn eitt ár síðan, at Makrel vóru settir at enda ólavsøkukonsertina. Ummælararnir hetta verða eitt fyriskipanarligt mistak, tí bólkurin við sínum serliga rokki slettis ikki megnaði uppgávuna.

Men fríggjadagin vístu Makrel, at nógv er broytt. Tónleikurin hjá Makrel er so øðiliga vakur, og við fráliku ljóðumstøðunum, sum festivalurin og tann dugnaligi ljóðmaðurin veittu, gjørdist upplivingin enn vakrari.

Ári Rouch er undir røttu umstøðunum og við rætta ljóðblandinum ein fongur hjá bólkinum. Hann syngur við so nógvari innliving og pínu í røddini, at hann rørir hjartastreingir á sama hátt sum gandakendi gittarin hjá Rasmus Rasmussen. Makrel eru í toppformi og eru til reiðar til at gera um seg uttanlands. Fyribils kunnu norðmenn og danir gleða seg, tí ólavsøkudag fara Makrel til Noregs at spæla á festivali, og í august gongur leiðin til Vega í Keypmannahavn.

G!

# Lunkaðir svenskir le



**Europe vóru høvuðsnavn á ársins G! Festivali. Tað sást á nógvu fólkunum, sum vóru stúvaði saman í sandinum fyri at hoyra gomlu svensku rokkstjørnurnar. Men tað var bert í hendinga løgum, at Europe fingu ordiliga fatur í fólkinum**

G!
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Meðan áhoyrarnir bíðaðu eftir hittunum Supersticious, Cherokee, Carrie og Final Countdown, stóðu fimm eldri rokktónleikarar og spældu nýtt og gott gamalt. Teir spældu væl, og sangarin sang væl, men í mun til Nephew, sum júst høvdu verið á sama palli, bliknaðu Europe.

Joey Tempest var eitt lívsstykki á pallinum. Hann svingaði við mikrofonstativinum og kastaði mikrofonina upp í luftina. Hann var sprenfullur av glamrokkattitúdu.

Tað var ikki so galið. Konsertin var handverksliga væl úr hondum greidd, og tá teir spældu síni kendastu løg, sungu og livdu fólk við. Men í stórar partar av konsertini stóðu fólk og prátaðu sínamillum. Tað fangaði sjáldan ordiliga.

Tá Carrie bleiv spældur, vóru nógvir tendrar á lofti, og fólk sungu við, men tað tóktist eitt sindur hálvhjartað av Europe. Tónleikararnir tóktust ikki ordiliga tendraðir.

## Nýggir sangir

Europe spældi nokkso nógv av nýggju fløguni. Hero, sum er á 15 teimum bestu í løtuni, er eitt sera 80' ara kent lag, og tað fall í rættiliga góða jørð. Okkurt av hinum løgunum, sum t.d. "Cause you gotta have faith" og tann ordiliga tungi "Wake up call" bera boð um, at bólkurin ikki heilt er útbrendur. Men konsertin sum heild, bar boð um mettar tónleikarar. Tað tóktist eitt sindur lunkað.

## Pínligt

Europe gjørdust veruliga pínligir, tá teir takkaðu fyri seg og fóru av pallinum, uttan at hava spælt "Final Countdown". Hetta er ein óskikkur, sum nógvir tónleikarar hava tikið til síns, mest sum fyri at tryggja sær at sleppa at spæla eykaløg, verða hittini goymd. Men tað vóru ikki serliga nógv, sum róptu eftir eykaløgum hetta kvøldið. Tað forðaði tó ikki Europe í at koma út aftur og spæla tvey løg, og enda við "Final Countdown". Hetta er ein rokkklassikari og øll sungu við. Hetta bøtti eitt sindur um heildarupplivingina.



